Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna

Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Mál á skrá á almennum fundi.**

26/00191: Tilmæli um broytingar í reglugerðini fyri Spælhúsið.

Niðurstøðan var, at tá støðan er sum hon við umvælingini á skúlanum, var tað ein trupulleiki at kommunan manglaði hølir til tiltøk, nú Bryggjan/Silkienni verur brúkt til annað virksemi. Semja var um, at reglugerðin kundi broytast fyribils.

26/00245: Umsókn frá Leu Kampmann um stuðul til jólakonsert í Vestmanna kirkju

Søkt var um 15.000 krónur til eina jólakonsert í Vestmanna kirkju. Bygdarráðið samtykti at stuðla við 10.000 krónum.

26/00188: Tilmæli frá teknisku nevnd um broyting í bygdarskipanini matr. 276h smb. umsókn frá Poul Eriki Johannesen.

Poul Erik Johannesen hevur søkt um prinsipielt byggiloyvi til at byggja frítíðarhús á matr. 276h. Skal tað loyvast, má bygdarskipanin broytast, so 276h gerst øki K: Frítíðarhús v.m. Tekniska nevnd mælti til at broyta bygdarskipanina og bygdarráðið tók undir við tilmælinum.

26/00190: Umsókn frá Mariusi í Garðastovu um at keypa lendi á matr. 155h.

Umsøkjarin hevur søkt um loyvi at keypa eitt lítið lendi millum matr. 155h og 157a. Tekniska nevnd og fíggjarnevndin mæla til at selja umsøkjaranum lendi. Bygdarráðið samtykti at taka undir við tilmælunum.

26/00029: Eykajáttan til meirútreiðslur av útbyggingini av kirkjugarðinum.

Tað mangla 388.000 krónur, sum eru til meirútreiðslur. Tað eru millum annað pengar, sum eru eftir frá í fjør og nýggjar útreiðslur til m.a. ráðgeving í ár. Bygdarráðið samtykti málið og verður lagt til bygdarráðið at taka støðu til við 2. viðgerð á næsta fundi.

26/00030: Eykajáttan til leiguútreiðslur.

Skiftandi avloysarar í læknaviðtaluni hava við sær, at kommunan hevur tørv á eini størri játtan til leiguútreiðslur. Tilsaman er talan um 85.000 krónur. Bygdarráðið samtykti málið við 1. viðger. Málið verður lagt til bygdarráðið at taka støðu til við 2. viðgerð á næsta fundi.

**Mál á skrá á afturlatnum fundi:**

26/00009: Ognartøka av lendi
26/00209: Ársins herðaklapp 2026